## Skeiðupplýsingar

| | |
|---|---|
| **Skeiðsnummar** | 8904.22 |
| **ECTS** | 15.00 |
| **Heiti** | Gerontologi, geriatrisk røkt og viðgerð |
| **Endamál** | Endamálið við skeiðinum er:<br>- at lesandi ogna sær vísindagrundaða vitan um og førleika til at menna gerontologiska/geriatriska røkt og viðgerð út frá eini Person Centered Care (PCC) tilgongd<br>- At lesandi ogna sær vísindagrundaða vitan og førleika at menna heilsufremjandi, fyribyrgjandi, endurmennandi, viðgerandi, og linnandi tiltøk fyri eldri fólk<br>- At lesandi við støði í góðkendum kanningaramboðum menna førleika at observera, greina og meta geriatriska sjúklingin<br>- At lesandi menna førleikar og ogna sær vísindagrundað amboð at menna praksis |
| **Innihald** | Á skeiðinum verður dentur lagdur á<br>- Skipan og karmar fyri eldrarøkt og -tænastu í Føroyum<br>- Gerontologi - Person Centered Care (PCC)<br>- Ástøði um tann sárbæra eldri<br>- Endurmenning innan eldraøkið - Serlig klinisk eyðkenni og sjúkumynd hjá eldri<br>- Multimorbiditet hjá eldri - Klinisk farmakologi og polyfarmaci til eldri<br>- Ymisk góðkend kanningaramboð<br>- Tvørfakligt og tvørsektorielt (geira) samstarv<br>- Etikkur innan eldrarøkt og –tænastu<br>- Palliatión |
| **Læru- og undirvísngarhættir** | Undirvísingin er skipað við skifti millum fyrilestrar, dialog, bólkabeiði, framløgur og sjálvlestur |
| **Próvtøkuháttur** | Skrivlig uppgáva |
| **Próvdøming** | Innanhýsis |
| **Próvtalastigi** | staðið/ikki staðið |
| **Lestrarlisti** | Verður ásettur í undirvísingarskránni |
| **Fortreytir** | Bachelor ella professiónsbachelor innan heilsufak |
| **Læruúrtøka** | Aftaná skeiðslok skal lesandi vera før/ur fyri at<br>- lýsa skipan og karmar fyri eldrarøkt og -tænastu í Føroyum<br>- Greiða frá serligum kliniskum eyðkennum og sjúkumyndum hjá eldri<br>- Greiða frá kliniskari farmakologi og polyfarmaci hjá eldri<br>- Greina viðurskifti, sum hava týdning fyri eldrarøkt og –tænastu<br>- Meta um tvørfakligt og tvørsektorielt (geira) samstarv<br>- Reflektera um etisk atlit innan eldrarøkt og –tænastu<br>- Greina viðurskifti, sum hava týdning fyri sárbær eldri<br>- Greina ein spurdóm frá praksis við støði í vísindagrundaðari vitan |
| **Stig** | Bachelor |
| **Ábyrgd** | Ása Róin, email: asar@setur.fo |

## Course information

| | |
|---|---|
| **Course number** | 8904.22 |
| **ECTS** | 15.00 |
| **Title** | |
| **Examination** | Internal |
| **Grading scale** | Passed/Not Passed |
| **Level** | Bachelor |
| **Contact** | Ása Róin, email: asar@setur.fo |